# Hvar er miðvøllurin hjá United?

**Meðan Chelsea hevur tikið kvørkratak um ensku Premier League, megna tey síðvandu feløgini ikki at standa London-felagnum kurl. United hevur ein ítøkiligan trupulleika á miðvøllinum, eftir at Keane er farin, og hesin trupulleiki gjørdist sera eyðsýndur í grannauppgerðini leygardagin**



*Fleiri av gomlu miðvallarkempunum eru burturi, men enn er eingin avloysari funnin. Eftirverandi spælararni - eitt nú Giggs - eru spakuliga við at koma upp í árini, og heldur ikki her tykist nakar avloysari standa beinleiðis í bíðirøð*

*Mynd: Reuters*

PREMIER LEAGUE
*Stefan í Skorini*

Nú Chelsea fekk enn ein tepran sigur, hesuferð ímóti Sunderland, svinnur vónin hjá hinum feløgunum at fáa teir aftur. Hetta var tíggjundi sigurin á rað, og tað ber boð um eitt lið, ið ríður á einum aldukambi.

United hevur roynt at geva eitt aftursvar uppá Chelsea dominansin, og United hevði undan hesum umfarinum ikki tapt í ellivu landskappingardystum. Hesuferð mátti United tó bíta í grasið, tá grannarnir úr City vunnu 3-1 á United.

Enn einaferð vóru veikleikarnir hjá hesum United-liðnum sera eyðsýndir, og liðið hevur ikki ta tyngd, ið áður eyðkendi manningarnar hjá Sir Alex Ferguson.

United hevur sum kunnugt mist Roy Keane, og Paul Scholes hevur fingið ein snudd í høvdið, so hann hevur ikki verið tøkur. Leygardagin var sentrali miðvøllurin mannaður við Darren Fletcher og John O´Shea, meðan Alan Smith sat á bonkinum.

Øll við einum sindri av kunnleika til førleikan hjá hesum báðum leikarunum vita, at hetta als ikki eru leikarar, ið hava tann kalibur, sum vit kunnu vænta av einum miðvølli hjá Manchester United - eitt av heimsins størstu feløgum.

Í seinna hálvleiki varð Alan Smith settur inn, men heldur ikki hann megnaði at seta seg ígjøgnum á miðvøllinum.

Spurningurin er síðani, hví Ferguson ikki hevur megnað at skift miðvøllin so líðandi, eftir at Keane og Scholes høvdu sæð sínar bestu dagar?

Hann hevur roynt at keypa miðvallarar, ið skuldu avloysa teir garvaðu á miðvøllinum, men hetta hevur ikki eydnast serliga væl. Eric Djemba-Djemba gjørdist ongantíð nakar avloysari hjá Keane, og Kleberson vísti seg heldur ikki sum nakar fongur hjá Ferguson.

Spurningurin er nú, um Ferguson kann finna ein veruligan tungvektara at manna tann defensiva miðvøllin. Spennandi verður at síggja, hvønn Ferguson kann fáa hendur á í summar. Spurningurin er eisini, hvussu leysar teymar Ferguson fer at fáa á marknaðinum við teimum nýggju eigarunum, sum Ferguson annars hevur róst fyri teirra góða samstarvsvilja eftir keypið av felagnum, ið ikki fall í góða jørð hjá viðhaldsfólki og ávísum leikarum.

Eingin ivi er tó um, at United harðliga hevur tørv á einum miðvallara, ið kann lyfta støðið á spælinum hjá liðnum. Miðvallarar felagsins eru heilt einfalt ikki nóg góðir, um United framhaldandi ætlar sær at seta dám á enskan og evropeiskan fótbólt.

### Arsenal gjørdi bart

Arsenal er farið nærkast Champions League plássunum aftur, og leygardagin vann Arsenal heili 7-0 á einum syndarligum Middlesbrough liði. Thierry Henry fekk trý mál, og hann vísti enn einaferð, hvussu týdningarmikil hann er fyri felagið, nú sáttmálasamráðingarnar eru farnar í gongd.

Tey bíða í spenningi eftir, hvat úrslitið av teimum samráðingunum verður. Henry hevur boðað frá, at hann fegin vil halda fram í Arsenal, har hann ferð eftir ferð hevur víst heimsflokk. Hinvegin vil hann eisini tryggja sær, at Arsenal hevur somu ambitiónir sum hann sjálvur um at vera í oddinum bæði heima og í Evropa. Eingin ivi er um, at framtíðin hjá Arsenal er nær tengd at, um Henry framhaldandi verður at síggja í Arsenal búnanum.

### Kewell gav Liverpool sigurin

Tottenham var á vitjan hjá Liverpool, og bert eitt stig var ímillum liðini undan dystinum. Spurs er tað liðið, ið hevur tikið seg mest fram samanborið við síðsta kappingarár, og teir liggja eisini á fjórða plássi, ið gevur rætt til luttøku í Champions League, og tað hevði verið eitt bragd at hollendska venjaranum Martin Jol, um tað eydnaðist.

Tað var tó Liverpool, ið vann ein tepran 1-0 sigur. Einasta málið skoraði Harry Kewell, tá hann fluktaði eitt innlegg úr høgru í netið. Hetta var fyrsta málið hjá avstralska leikaranum í trettan mánaðir, og seinastu vikurnar hevur hann leikt eins og hann gjørdi í Leeds, tá hann varð mettur sum ein tann besti offensivi miðvallarin í Onglandi.

Komandi vikuskiftið møtast arvafíggindarnir Manchester United og Liverpool á Old Trafford, og tað verður óivað eitt brak. Christiano Ronaldo fekk reytt kort hetta vikuskiftið, og tí verður hann ikki tøkur til dystin ímóti Liverpool, um ikki dómsnevndin hjá enska fótbóltssambandinum velur at strika kortið, sum teir neyvan fara at gera.

## Staunton verður landsliðsvenjari

Írska fótbóltssambandið váttaði fríggjadagin gitingarnar um, at tað verður Steve Staunton, sum nú skal taka við leiðsluni av landsliðnum. Sum hjálpara hevur hann ongan minni enn Bobby Robson

Tað hevur verið væntandi frá flestu síðum, at tað bleiv Staunton, sum skuldi loysa Brian Kerr av. Kerr fekk sekkin, tá tað ikki eydnaðist Írlandi at spæla seg til HM-endaspælið í okkara bólki.

Hóast hetta er fyrsta venjarastarvið hjá Staunton, so er hann ikki nakar unglingi í fótbóltshøpi. 102 feðrir spældi hann fyri Írland, og hetta er met. 16 av hesum dystunum var hann liðskipari, og í feløgum sum Liverpool og Aston Villa hevur altíð væl stríðandi Staunton gjørt nógv um seg sum spælari.

Í Írlandi rokna tey við, at Staunton fer at megna leiklutin at motivera spælarar sínar til stórar uppgávur fyri Írland. Hartil hevur hann fyrsta árið eisini fingið avtalu við fyrrverandi enska landsliðsvenjaran, Bobby Robson, um at hesin skal koma við góðum ráðum. Og eisini hetta verður mett sum sannur fongur fyri Írland.

**-mørk**

## Dudek hóttir við verkfalli

Tað eru tó ikki øll, sum eru eins fegin um Rafael Benitez. Polski málverjin hjá Liverpool, Jerzy Dudek er í øðini inn á venjaran, og sambært soccernet.com hóttir hann núvið verkfalli, um hann ikki verður seldur. Stóra hetjan í Champions League sigrinum hjá Liverpool, hevur mist plássið millum stengurnar til Jose Reina og plássið á beinkinum til Scott Carson, ið báðir komu til Liverpool í fjør.

Tí hevur Dudek biðið um at verða seldur. Men nú metir hann prísin vera ov høgan, ja beinleiðis absurdan. Liverpool krevur 30 mio. kr. fyri málverjan, ið er 33 ára gamal. Hetta er so høgur prísur, at Dudek ikki væntar at verða seldur í januar. Hetta kann gera møguleikarnar hjá pollakkinum at sleppa við til HM smáar. Tí sigur hann nú, at hann ikki spælir ein dyst fyri Benitez aftur. Hann sigur við Daily Sun, at hetta bara er tað seinasta tvætli, sum Benitez hevur funnið uppá.

**-SíS**

## Tríggir úr Tottenham til Portsmouth

Portsmouth hevur veruliga brynjað seg til seinnu hálvu av landskappingini, og í dag keypti felagið tríggjar leikarar frá Tottenham.

Talan er um teir tríggjar Sean Davis, Pedro Mendez og Noe Pamarot, ið framyvir skulu spæla við Portsmouth. Redknapp hevur nú keypt tilsamans fimm leikarar, síðan hann gjørdist venjari hjá Portsmouth, ið liggur í botninum í Premier League.

Redknapp er settur at bjarga felagnum undan niðurflyting, og teir nýggju leikararnir skulu sjálvsagt syrgja fyri hesum.

Russiskiríkmaðurin, Alexandre Gaydamak, hevur júst sett nógvan pening í felagið, og tað gevur venjaranum møguleika at keypa nýggjar leikarar.

Portsmouth hevur latið 7,5 milliónir pund fyri teir tríggjar leikararnar frá Tottenham.

**-SíS**

## Blað lumpaði Eriksson

Enskir fótbóltsfjepparar fingu ein hvøkk, tá blaðið News of the World segði seg hava avdúkað, at landsliðsvenjarin hjá Onglandi, sviin Sven-Göran Eriksson, er sinnaður at fara úr starvinum við teirri treyt, um hann fær 55 milliónir krónur í ársløn aðrastaðni

Talsfólk hjá Eriksson vísa tó aftur, at hetta skal hava nakað við veruleikan at gera, og hava greitt frá í BBC, at talan er um ”beran heilaspuna”.

Eitt tíðindafólk frá News of the World segði seg annars vera arabiskan ríkmann, og hesin kunnaði seg um møguleikarnar at keypa Eriksson úr landsliðssessinum, og hetta vil sviin heldur ikki vísa aftur. Sven-Göran Eriksson, sum hevur verið landsliðsvenjari í hálvtsætta ár sigur, at alt er møguligt, men sigur seg tó ikki vilja fara úr sessinum í ótíð.

Sven-Göran Eriksson, ið fekk eitt falskt tilboð áljóðandi 55 milliónir krónur um árið eftir skatt, avdúkar, at verandi sáttmálin honum 30 milliónir krónur netto inn á bankabókina.

*-theodor*

## Benitez aftur besti venjari

Rafael Benitez er kosin besti venjari í desember mánaði. Hetta er aðru ferð á rað, at hann fær hendan heiðurin.

Liverpool var á einum sonnum aldukambi og hevði eina røð uppá fimm sigrar í desember mánaða, og samlaða sigursrøðin hjá liðnum kom harvið uppá tíggju dystir.

Liverpool vann í desember ímóti Wigan, Middlesbrough, Newcastle, Everton og West Bromwich Albion. Nú er sigursrøðin hjá Liverpool tó steðga, tá teir bert fingu javnt ímóti Bolton í januar mánað.

Liverpool liggur í løtuni á triðja plássi - eitt stig aftan fyri Manchester United. Liverpool hevur tó spælt tveir dystir færri enn arvafíggindarnir.

**-SíS**

### Premier League, úrslit

| | |
|---|---|
| Leygardagin | |
| Manchester City-Manchester Utd. | 3-1 |
| Arsenal-Middlesbrough | 7-0 |
| Aston Villa-West Ham | 1-2 |
| Charlton-Birmingham | 2-0 |
| Fulham-Newcastle | 1-0 |
| Liverpool-Tottenham | 1-0 |
| Portsmouth-Everton | 0-1 |
| Blackburn-Bolton | 0-0 |
| Sunnudagin | |
| Wigan-West Brom. Albion | 0-1 |
| Sunderland-Chelsea | 1-2 |